LM-099/2023

Fylgiskjal 60

Tórshavn, 23. februar 2024

Hoyringarsvar til Ferðavinnulógina

Grundasjónarhorn ísv lógarsmíð, fyrisiting og tulking

Tá farið verður í holt við at endurskoða, smíða og tulka lóg er gott at hava áminning Kára á Rógvu, sála, doktara í løgfrøði, í huga um at lata lóg tæna heldur enn trælka;

- lóg skal bara skipa tað, sum neyðugt er at skipa,
- lóg skal í tráð við markregluna ikki skerja frælsið einstaklingsins meir enn hægst neyðugt fyri at røkka ætlaða endamálinum, og
- umframt at taka atlit til, hvat lóggevi ætlaði, skal lóg og tulking hóska til samfelagsviðurskifti og førið, har lóg verður nýtt.

Markregla verður nýtt í fyrisitingarrætti, men skal eisini nýtast í sambandi við lógarsmíð og tulking. Tí hvat gevur í grundini (sam)felagsskapinum - og lóggevara - rætt til at avmarka fræslið hjá einstaklinginum, ið frá føðingini er (ella átti at verið) frælsur og bert avmarkaður av atlitum til ikki at skaða næstan, men verður óviljað tvungin at gerast partur av tí (sam)felagsskapi, sum nýføðingurin verður føddur og tvungin inn í?

Fyri at kunna viðgera spurningin um ferðavinnulóg og gongd í haga á skilvísan hátt er gagnligt og helst neyðugt at líta eitt sindur uttan um okkum.

Rættarstøðan í londum, sum vit vanliga samanbera okkum við

Í seinnu helvt av 1700 og byrjanini av 1800-talinum fóru evropearar av álvara fóru at leita sær út í náttúruna, og gjørdist tey greið yvir heilsubøtandi árinið av at koma út í náttúruna, bæði fyri sinn og skinn. Eftir hetta bleiv tann parturin av náttúruni, sum kann roknast sum uttangarðslendi, líðandi latin upp fyri almenninginum. Umframt aldargomlar almennar gøtur millum bygdaløg blivu nýggjar almennar gøtur eftir torvi gjørdar fyri at geva bæði innlendis fólki og gestum møguleikar til at koma út og njóta náttúruna. Hetta var bæði har tað annars kann vera ov illgongt ella har tað við atliti at serligum djóra ella plantulívi verður mett neyðugt við gøtum fyri at stýra gongdini og/ella fyri at verja ímóti ella bøta um slit.

Royndirnar vísa, at har sum gøtur eru gjørdar, ganga so at siga øll ella í hvussu so er tey allar flestu á gøtunum. Í nøkrum londum verður æra sett í at gera minni ásjónligar, men tó avmerktar og við hvort eitt sindur styrktar rásir ella sniðgøtur til tey fáu, ið kanska ynskja at fáa serligt upplivilsi við ikki alla tíðina at ganga í rekkju eftir høvuðsgøtu, kanska eisini "ótraðkaða leið", sonevnt "Off Piste".

Í Norðurlondum og øðrum av okkara grannalondum, t.d. Skotlandi, og yvirhovur í Vesturevropa, íroknað øll londini, sum eru fevnd av Alpunum, eru ognarrættur og rættur at ganga og uppihalda sær í náttúruni atskild fyribrigdi. Har hevur almenningurin, eisini útlendingar, fría atgongd til hendan partin av náttúruni uttan at biða um lov og uttan at gjalda, bert við skyldum til at halda almennar reglur um t.d. ikki at veiða villinidjór, taka plantur upp við rót, umframt minst møguligt fótafar, t.d.

ikki at blaka rusk frá sær. Hetta er sonevndur alramannarættur og er galdandi fyri alt tað, sum er ódyrkað jørð, umframt skóg, eisini um hon verður rikin vinnuliga.

Talan er um fólkaræðisliga atgongd til náttúru, sum hevur verið frá upphavi, og sum eingin tí eigur at kunna taka sær einkarætt til, men kann fáa litið upp í hendur at gagnnýta ávís lunnindir við avmarkingum motvegis náttúru, undirgrund, fornminnum, almennum gøtum og grannum.

Rættindi hjá jarðeigarum og festarum eru avmarkað til nýtslurætt til vanlinligt jarðarbrúk, ið við hóskandi avmarkingum og skyldum, og fevnir um at velta, sláa gras, beita djór, ofta eisini um lunnindir so sum at veiða djór. Rættindini fevna ikki um eitt nú evnir í undirgrundini, grundvatn, metal, olja osfr., og heldur ikki um at nokta fólki atgongd og/ella at leggja avmarkingar ella gera meiri ella minni tilvildarligar staðbundnar reglur, ið kunnu nýtast ella misnýtast til at avmarka atgongdina. Møguligar avmarkingar í atgongd eru í alment galdandi reglum tvørtur um tað slagið landslagi, náttúru ella skóg, sum talan er um, t.d. í Danmark fyri vinnuliga riknar skógir. Heldur ikki hava jarðeigarar loyvi at dálka ella gera seg inn á náttúru, fornminnir og annað. Ásannað verður, at hvørki ognari ella festari fær tikið jørðina við sær í grøvini, og at ognarrætturin er avmarkaður av aðrari lóggávu.

Alramannarætturin kann bæði løgfrøðiliga og praktiskt vera eitt sindur ymiskur frá landi til land. Í summum londum er t.d. loyvt almenninginum at seta upp tjald uttan fyri bøgarðarnar í upp til nøkur samdøgur á sama staði, tó við ávísari frástøðu til hús og serligum kravi ísv bál og annað, og sumstaðni, eitt nú í Noregi, er loyvt at henta ber og annað uttangarðs. Í Danmark er sum vera man sera lítið til av ódyrkaðari jørð. Tó er almenn atongd til strendur og ódyrkað lendi, umframt til skóg, eisini har sum skógin verður rikin sum partur av landbúnaðarvinnu við framleiðslu av trøum og/ella timbri, ið sostatt á ein hátt kunnu metast javnt við velt innangarðsjørð.

Gjald, trygd og tænasta

Tað er ein almenn meginregla, at gjald bert kann takst fyri ítokiliga tænastu, sum tó eisini kann fevna um t.d. serligt parkeringspláss, ið jarðeigari ger til sínar gestir.

Bert í serligum førum, har mett verður neyðugt við serligari eftiransing og hjálparfólki, kann eitt gjald verða tikið frá vitjandi, t.d. í hendinga tjóðargarði, tó at almenningurin vanliga hevur fría, ókeypis atgongd til flestu tjóðargarðar. Tó kann í Suðurevropa onkrastaðni vera talan um tíðaravmakrað gongugjald fyri at ganga á gotu, ið er serstakt gjørd til endamálið, til kostnaðurin er vunnin inn aftur.

Annars ganga fólk, eisini í tjóðarparkum við atgongugjaldi, undir egnari ábyrgd.

Tá talan er um trygd kann verða mint á, at vandin fyri lív og heilsu er so ómetaliga nógv storri í vanligu bilferðsluni, við at roykja, við at anda dálkaðu luftina í býarokjum í seg, heima við hús, har flestu óhapp henda, fyri ikki at tala um vandan við alsamt at liggja heima á sofuni. At hava fría atgongd til náttúruna, verið jarðildið undir henni almenn ella privat ogn, verður sæð sum týðandi fyri fólkaheilsuna og í alsamt storri mun sum ein fólkarættur.

Føroyska jarðarlóggávan vorðin til í aðrari tíð

Víst verður ofta við stoltleika til, at ásetingarnar í føroysku lóggávuni eru aldargamlar, hava sín uppruna í Seyðabrævinum. Óivað so. Men verður hugsað um feudala samfelagið, ið tá var við m.a. trælahaldi, og har so at siga bara kirkjan, seinni kongur og aðalin, umframt størri jarðeigarar, í føroyum eisini festarar, høvdu framsøgurætt, er í dag talan um heilt annað samfelag, annar hugburður og onnur rættindi hja almenninginum. Tá høvdu hvørki kvinnur, fæloysingar ella ófræls - meginparturin av fólkinum - framsøgu- ella atkvøðurætt. Aldargamla lóggávan kann tí valla metast at byggja á demokratiskt grundarlag.

Við upplýsingartíðini broyttist fatanin av menniskjanum, eins og fólkið varð loyst frá sonevnda stavnsbandinum, har fólkið hevði verið bundið til at trælka á tí garði og/ella í tí øki, sum tað var føtt í. Valla ynskir nakar ta tíðina og tann tíðarandan aftur?

Ávirkan á landbúnað og náttúru

Undirritaði eri landbúnaðarfrøðingur, og skulu fakligu viðmerkingarnar síggjast í ljósinum av hesum. Hóast tað øvugta mangan verður ført fram, hevur gongd og uppihald í haga ikki ella bert í ótýðandi mun neiliga ávirkan gróður, seyð, fugl ella onnur náttúruviðurskifti. Flest gongufólk taka heldur rusk upp, t.d. patrónhylki, enn at blaka frá ella lata eftir sær.

Viðvíkjandi fugli ber aloftast til at verja fuglaføli betri við at merkja rásir ella gera gøtur burtur frá hesum.

Í ringasta føri gerst seyðurin spakur, sum kann gera hann torførari at reka, men sum til ber at loysa við at nýta hundar í seyðarakstri ella á annan hátt. At friða hagan fyri atkomu hjá almenninginum í t.d. lembing er at skjóta langt yvir málið. Í stórplássum og nógvastaðni kring landið verður seyðurin sum heild ambætaður fram við lands- og høvuðsvegi, sum ærnar trekkja seg eitt sindur burtur frá, tá tær skulu lemba, men órógvar vanlig hagagonga ikki annars. Neyvan er seyðurin úti um landið av munandi øðrum slag enn í stórplássum og fær væl vant seg við vanliga hagagongu, serliga um tað fer fram eftir føstum, avmerktum leiðum.

Seyðabeiti og yvirbit hava nógv, nógv størri ávirkan á gróðurin í føroysku hogunum enn hagagonga. Mint verður á, at tað í Føroyum helst ganga um 70.000 áseyðir árið runt, umframt brundar og lomb helvtina av árinum, meðan bert ein partur av landsins íbúgvum í miðal ganga eina til nakrar ferðir árliga, og kanska líknandi tal av ferðafólki sum seyðurin, tó í miðal bert fáar tímar árliga.

Serfrøðingar seta ofta spurnartekin við, í hvønn mun vit hava føroyska náttúru, heldur enn eitt sonevnt kulturlandslag, ið er fullkomiliga stýrt av seyðabitinum. Okkurt undantak kann vera í erva, har gróðurin kann vera frá undan seinastu ístíð, umframt í bjørgum og gjáum, har seyður ikki sleppur til. Sagt verður, at verulig føroysk náttúra er mestsum bara til í smærri bitum, tó at fjall, líðir, dalar, áir, gil osfr. sjálvsagt fagurfrøðiliga geva eygleiðaranum fatan av náttúru.

Sjálvt í teimum lutfalsliga fáu stoðum, har sera nógv fólk gongur, er tað bert í heilt fáum førum og stoðum, at hol slítist á svørðin. Júst har sum tað hendir, eigur land og kommuna at traðka til við fyribyrjandi og botandi atgerðum.

Flestu skriður (jarðlop) eru heilt ella lutvíst ávirkað av yvirbiti. Høvuðsorsøkin er, at plantur laga longdina av rótunum soleiðis, at longd á og mongd av planturótini í høvuðsheitum gerst lík longd

og mongd av plantuni, ið er oman fyri svørðin. Seyðuin bítur tætt, og helst bara tað, sum er lutfalsliga nýliga sprottið og fult av proteini og sukri, og sum tí oftast er styttri enn 5-7 cm. Tá so svørðurin í vetrarhálvuni er fullur av vatni og stundum frystir, lyftir frostin svørðin upp frá og kann slíta sambandið við jarðildið undir hesum.

Har sum bara seyður beitir, gerst plantufjølbroytni í haganum eisini fátækari, tí seyðurin sum nevnt fer eftir plantum og plantupørtum við serliga høgum innihaldi av proteini og sukri, sum gevur øðrum plantum við lægri føðsluinnihaldi kappingarfyrimun til at breiða seg, soleiðis at sera fá grassløg og mosi at enda mynda gróðurin í haganum. Tá óbitið gras følnar kann mosi við tíðini taka yvir. Mosi bindur illa til svørðin, og tá er eisini skjótt, at hol kemur á svørðin.

Viðv. haruskjóting er eingin saklig grund til at stongja almenningin úti frá náttúruni í heilar 2 mánaðir, tá harsuskjóting oftast bert gongur fyri seg í ein ella fáar dagar.

Hvar staðfesta tættur at ganga og uppihalda sær í nátturuni?

Best hevði verið, um rættur til almenna atgongd til náttúruna varð tryggjaður í grundlóg ella grundlógarlíknandi lóg og at náttúran, íroknað luft, sjógvur, vatn, grót og mold, plantu og villini djór og sum minstamark lendið uttan fyri bøgarðarnar varð allýst sum ogn Føroya fólks á ein hátt, at tað ikki stríður ímóti tey rættindi og tær avmarkingar, sum ognarrættur eisini í okkara grannalondum fevnir um. Okkara upprunaligi rættur bygdi á Norska lóg, hvørs menning upp gjøgnum tíðirnar tað kann vera hóskandi at taka til fyrimynd.

Slíkt hevur tó leingi ligið eftir á og kann eisini frameftir taka rúma tíð. Nú hovi býðst til at staðfesta almenna atgongd til náttúruna, og líknandi hovi neyvan býðst aftur í bræði, er tí betri enn einki - og her og nú óivað neyðugt - at almennur rættur til náttúruna verður staðfestur í komandi ferðavinnulógini, soleiðis at eisini rættarstøðan, ið hevur verið praktiserað í yvir hálvthundrað ár, verður staðfest í tíðarhóskandi lóg og kend av aktørum og gestum.

Hetta tí at vanlig fronsk-donsk – og harvið eisini føroysk – løgfatan, er rættuliga einføld og bókstavatrúgv og skilir valla vinarligu áminning Kára á Rógvu, sála, um at tulka ásetingarnar inn í egnu tíð og eftir nútíðar umstøðum. Hetta hóast tulking serliga í smáum løgdømum sum tí føroyska kann tykjast alneyðug fyri at megna at fylgja við tíðini uttan óneyðuga seina samfelagsmenning vegna tess, at lóggávan alsamt skal tillagast og endurnýggjast.

Serstakar viðmerkingar til avtøku av ásetingum í Lov for Færøerne om Hegn og Markfred (Girðingarlógin)

Ásetingarnar í §§ 40-43 í donsku Lov nr. 171 af 18. maj 1937 for Færøerne om Hegn og Markfred, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 91 frá 7. juni 2020, síggjast at vera í beinleiðis andsogn við nútíðina og við bæði anda og innihald í uppskotinum til ferðavinnulóg. Nevndu ásetingar eru avskrivt av eldri lóg frá 1800-talinum, sum aftur var avskrivt av eldri lóg frá lens- og feudaltíðini, har tað umframt at forða fyri seyðastuldri ráddi um at kúga almúguna. Ásetingarnar eru sostatt endurljóð úr tíð, tá vanligi føroyingurin var kúgaður av ráðandi stættunum, serliga størri jarðeigarum og festarum, sum yvirhovur mannaðu løgtingið og har (mis)nýttu sítt vald til at kúga

vanliga fólkið: løgmaður var næstan altíð ein bóndi, umframt sýslumenn og løgrættumenn, og leingi var eisini tingskrivarin valdur millum bóndurnar. Sum dømir um kúgandi hugburðin kunnu takast, tá soldátarnir á Skansanum í 1600-talinum blivu tiknir til at halda vakt til at ansa eftir, at borgarar í Havn ikki skuldu fara út um Reynið fyri at vála um landið og bidda ull og henta lesull, sum tey virkaðu og gjørdu til pløgg og seldu einahandlinum, soleiðis at tey kundu forvinna sær til egið uppihald. Og tá stóra yvirvágin av bóndum á løgtingi í samráð við fyristøðufólkið fyri kongaliga einahandlinum, í 1777 í menningartíðini við Rybergshandlingum við *trælalógini* trælabundu fólkið á gørðunum og forðaði teimum at seta fót undir egið borð, hóast tey annars megnaðu at uppihalda sær sjálvum. Annað dømi er *bátsbandið*, triða dømi mótstøðan frá bóndastættini ímóti traðarlóggávu, sum heilt upp í tíðina hjá okkara nærmastu forfedrum, var ætlað at geva fæloysingum møguleika at uppihalda sær sjálvum og seta egið búgv, og sum m.a. endurspeglast í sonevndu *Gráubók* (J. Patursson) og *Gráa Tátti* (helst Hans Jacob Jacobsen).

Nevndu lógargreinir §§ 40-43 eru í kapitli 5 um *Færdsel på Andenmands grund.*

§ 40 snýr seg um at ferðast innangarðs:

§ 40. Den, som uden Nødvendighed eller uden dertil erhvervet Hjemmel gaar over anden Mands Indmark, straffes med Bøder. Er Forseelsen begaaet af Barn under 14 Aar med Vidende af Forældre eller dem, der træder i Forældres Sted, anses disse, som om de selv havde begaaet den ulovlige Handling.

Med samme Bøde som ovenfor angivet straffes den, der ikke tillukker anden Mands Port eller Led (derunder ogsaa Port eller Led i fælles Hegn), som han har aabnet, selv om Husdyr ikke derved kommer ind paa anden Mands Ejendom.

Ásetingin er óneyðuga restriktiv og revsingin alt ov hørð í mun til revsing fyri onnur brot. At fara at broyta orðingar í hesi lóg til aðrar mildari orðingar á nútíðardonskum kann tykjast undarligt, og somuleiðis tað at skriva nýggjar føroyskar ásetingar inn í donsku lógina tykist óhóskandi. Tí tykist frægast at taka mest møguligt burtur út lógini uttan at skriva nýtt, í tann mun hetta er gjørligt við tí í huga, at tað ikki gjørligt og neyvan heldur neyðugt at regulera øll lívsins viðurskifti í lóg.

Í andanum hjá Kára á Rógvu tykist als ikki neyðugt ella hóskandi við áseting 40, tíansheldur við revsiáseting í hesum. Eisini seinni parturin um hegnsportur kann striðkast. Avbjóðingar við opnum hegnsportrum standast av og kundu lættliga verið loystir, um partarnir, sum hava hegnsskyldu, virða og halda seinastu ásetingina í § 15: *"Ethvert Led i Hegn om Indmarken skal være forsynet med forsvarligt Lukke og, bortset fra Led, der er bestemt til at passseres af Koretøjer, indrettes saaledes, at det, hver Gang det aabnes, falder tilbage af sig selv, og at det, for saa vidt det findes i Hegn mod haugen, aabnes ud imod denne."*

Flestoll hegnsyldug bróta í dag §15, sum ger, at portur kunnu koma at standa opin av ósketni, uttan at manglandi vilji til at halda lóg er uppií. Tá er ikki hóskandi at revsa við bót. Verður ásetingin í § 15 um skap á portrum hildin av teimum hegnskyldugu, fer portrið sjálvt aftur, uttan so at ferðandi gera sær ómaka og tilvitað gera fortreð.

Hóskandi kundi ein áseting verið sett í uppskotið til ferðavinnulóg um, at har sum serliga nógv gonga er um hegn, kann tann, sum hegnskyldu hevur, heita á kommunu ella land um at yvirtaka

skylduna til at gera og viðlíkahalda hóskandi portur á staðnum. Eisini kann kommuna ella landið av sínum eintingum yvirtaka portrið og skylduna til at gera og viðlíkahalda hetta. Slík áseting kundi samstundis, har tað annars er gjørligt og viðkomandi, latið upp fyri, at ávís portur og gøtur blivu nýtiligar fyri rørslutarnað.

§ 41 í girðingarlógini um gongd uttan fyri bygdagøtu er fullkomiliga ótíðarhóskandi og í andsøgn við uppskotið til ferðavinnulóg, bæði áseting og revsing sæð í mun til revsilóg og aðrar lógir, ið krevja rættuliga grov brot, t.d. innan umhvørvi, áðrenn revsað verður:

§ 41. Den, som, uden at dertil er Hjemmel, gaar uden for ret Bygdevej i Hauge, hvor han ikke er Lodsejer, eller i Fælleshauge, for hvilken Vedtægt om Lodsejernes Færdsel er oprettet paa Haugestævne under Sysselmandens Ledelse (jfr. Haugelovens § 3), straffes med Bøder; gaar han ulovlig med Hund, betragtes dette som en skærpende Omstændighed.

Tann seinasti parturin um at hava hund við sær, verður - í sambandi við samstarv millum eigarar og hagar – reguleraður aðrasteðs í lógini. Í mun til ferðafólk kann áseting um hund handfarast av áseting í uppskotinum til ferðavinnulóg, og gerast til partur av almennum skilhaldsreglum galdandi fyri alt landið, við hóskandi undantøkum.

Á almennum hoyringarfundi um uppskotið til ferðavinnulóg í skúlanum við Streymin varð fort fram, at landsstýrismaðurin við bann ímóti at ganga við hundi var í ferð við at gera seg inn á altjóða sáttmála ísv rætt hjá eitt nú blindum at hava hund við sær. Slíkt páhald er misskiljing og stendst helst av teirri *betongjuristisku* bókstavtulking, sum Kári á Rógvu, sáli, eggjaði til heldur at nýta vit og skilt til at vinna á.

Felagsevropeiska rættarskipanin hevur ferð eftir ferð við dómi staðfest - og lagt eitt nú Danmark eina við - at altjóða ella millumlanda sáttmáli, sum eitt løgdømi er fevnt av, hevur løggildi fram um nationala (lokala) lóg og reglur. Hetta er galdandi beinanvegin altjóða sáttmálin kemur í gildi og áðrenn samtyktin úr altjóða sáttmáli er umsett og sett inn í serstaka lokala lóg og regluverk. Og tað er galdandi uttan mun til, um lokala reglan er frá áðrenn ella eftir at sáttmálin tók við. (Heilt aktuelt er hetta orsøkin til, at TAKS ikki sleppur í hægstarætt við avgerð um dupultskatting, sum beinleiðis stríður ímóti millumlanda avtalu).

Tað er eisini vanlig løgfrøðilig grundlæra, at almennar áseting ikki ganga fram um sjálvsogd undantøk sum rættur hjá blindum at nýta fórarahund, eisini t.d. at hava hundin við sær inn á bókasavn, har tað annars kann verða lýst alment bann ímóti at hava hund við sær. Í tí ítøkiliga fórinum hevði tað sostatt ikki verið landsstýrismaðurin, ið hevði gjørt seg inn á altjóða sáttmála, men heldur tann sum noktar, fórðar, meldar ella, serstakliga um tað almenna reisti ákæru, gav bót ella feldi dóm yvir blindum hundafórara, tí løgdømið hevur serliga skyldu til at tryggja, at innihaldið í slíkum sáttmála verður breitt út og gjørt virkið.

Viðv. § 42 í Girðingarlógini hava umboð fyri eigarar og brúkarar av føroyskum hogum á hoyringarfundum um uppskotið til Ferðavinnulóg fort fram, at ásetingarnar í § 42 mest skipa viðurskiftini millum hagar og koma at mangla í, um tær verða avtiknar.

§ 42. Gang gennem fremmed Hauge er tilladt i følgende Tilfælde:

1. *Haugerøgter har Ret til at søge efter sin Hauges Faar, naar han hver Gang underretter en af den anden Hauges Røgtere derom saa betids, at de kan følges ad eller mødes ved Markeskel, og naar han fører sin Hund i Baand.*
2. *Enhver har Ret til om Dagen at søge efter sin Hest eller sit Kvæg, naar han forud melder det til en af Haugens Røgtere. I øvrigt kan Bestemmelser herom træffes ved Vedtægt af Ejerne af Bygdens Hauger i Forening paa Grandestævne (jfr. Grandestævnelovens §§ 1 og 12).*
3. *Enhver er berettiget til at hente sine Tørv; dog skal han gøre det om Dagen og gaa ad den almindelige Vej.*
4. *Gang til fjernereliggende Hauge, Fuglebjerg eller anden Udmark, som den paagældende eller den, i hvis Ærinde han gaar, ejer eller har Brugsret over, er tilladt, for saa vidt den hjemles ved det, som paa ethvert Sted er gammel Skik og Brug. Om saadan Færdsel i øvrigt skal være tilladt, afgøres af Landvæsenskommissionen, saafremt Parterne ikke i Mindelighed enes derom eller bliver enige om Sagens Henvisning til Voldgift.*

Dagen regnes i de i Punkt 2 og 3 anførte Tilfælde om Sommeren (det er fra den 14. April til den 31. August) fra Klokken 5 om Morgenen til Klokken 9 om Aftenen og om Vinteren (det er fra 1. September til 13. April) fra om Morgenen, naar Dagsskæret begynder, til om Aftenen, naar det ender.

Undir hoyringunum lovaði Landsstýrismaðurin at enduskoða, hvørjar ásetingar møguliga kunnu standa eftir. Ásetingarnar í § 42 síggjast at verða rættuliga avoldaðar. Helst hava upprunaligu ásetingarnar skula fyribyrgja seyðastuldri. Sum skilst kann – og kemur - stuldur av seyði stundum fyri, sjálvt í nútíðarsamfelagnum, men fer helst mest fram við at nýta hund og/ella við at nýta aðrar snildir, og kann nærum bara ganga fyri seg fram við landsvegi, har til ber at goyma stjolnan seyð í bili, ikki við vanliga hagagongd.

Ástøðiliga kunnu partar av § 42, kanska serliga ásetingin í nr. 1 nýtast til at fyribyrgja ella forða hesum. Um so er eigarar og brúkarar av føroyskum høgum og teirra umboð halda fast í, at tørvur eisini undir dagins viðurskiftum er á at regulera viðurskiftini millum hagar á henda hátt, kundu partar verið tiknir burtur, og restin loyvd at standa eftir uttan annars at skriva nýggja tekst. Tað kundi t.d. verið gjørt nakað soleiðis (reytt avgjørt striðkast, brúnt kann striðkast):

§ 42. *Gang gennem fremmed Hauge er tilladt i følgende Tilfælde:*

1. *Haugerøgter har Ret til at søge efter sin Hauges Faar, naar han hver Gang underretter en af den anden Hauges Røgtere derom saa betids, at de kan følges ad eller mødes ved Markeskel, og naar han fører sin Hund i Baand.*
2. *Enhver har Ret til om Dagen at søge efter sin Hest eller sit Kvæg* (restin er helst óneyðug og kann alt nr. 2 meiri hóskandi takast burtur og í staðin skipast sbrt. Grannastevnulógina: *, naar han forud melder det til en af Haugens Røgtere). I øvrigt kan Bestemmelser herom træffes ved Vedtægt af Ejerne af Bygdens Hauger i Forening paa Grandestævne (jfr. Grandestævnelovens §§ 1 og 12).*
3. *Enhver er berettiget til at hente sine Tørv; dog skal han gøre det om Dagen og gaa ad den almindelige Vej.*
4. *Gang til fjernereliggende Hauge, Fuglebjerg eller anden Udmark, som den paagældende eller den, i hvis Ærinde han gaar, ejer eller har Brugsret over, er tilladt, for saa vidt den hjemles ved det, som paa ethvert Sted er gammel Skik og Brug. Om saadan Færdsel i øvrigt skal være*

LM-099/2023

tilladt, afgøres af Landvæsenskommissionen, saafremt Parterne ikke i Mindelighed enes derom eller bliver enige om Sagens Henvisning til Voldgift.
Dagen regnes i de i Punkt 2 og 3 anførte Tilfælde om Sommeren (det er fra den 14. April til den 31. August) fra Klokken 5 om Morgenen til Klokken 9 om Aftenen og om Vinteren (det er fra 1. September til 13. April) fra om Morgenen, naar Dagsskæret begynder, til om Aftenen, naar det ender.

§ 43 er um gongd við hundi gjøgnum annans haga. Til ber at lata høvuðsinnihaldið standa nakað soleiðis:

§ 43. *Gang med Hund gennem fremmed Hauge er tilladt, naar den sker ad ret Bygdevej, og naar Hunden føres i Baand. Naar en Flok Faar skal drives gennem fremmed Hauge, er det tilladt at bruge løse Hunde dertil, dog mod fuld Erstatning for den Skade, de afstedkommer i Haugen. Mod samme Erstatning kan ligeledes de til Røgt og Fjeldgang i fjernereliggende Hauge nødvendige Hunde føres løse frem og tilbage igennem fremmed Hauge. Hvorledes Haugerøgter i øvrigt skal føre sin Hund, naar han maa gaa gennem fremmed Hauge for at komme til sin egen, afgøres som fastsat i § 42, Punkt 4, sidste Punktum.*

Vinarliga,

Roar Heini Olsen

Landbúnaðarfrøðingur

LM-099/2023

Annika Petersen

Fra: Roar Olsen <roar61@gmail.com>
Sendt: 27. februar 2024 19:03
Til: VMR-Journal
Emne: Stutt ískoyti til longu sent hoyringarskriv ísv ferðavinnulóg

Demokrati
Fá lógartilgongd hevur verið meiri demokratisk enn hendan og fevnt um fleiri hoyringar, undir 3 ymiskum landsstýrisfólkum í minsta lagi 3 ymiskar hoyringar av ávirkaðum pørtum, umframt almennu hoyringarnar.

Upphædd og raðfesting har sum tørvurin er størstur
Hildið verður, at ætlaða ferðavinnugjaldið er ov lítið. Fyri fyrst ja, men upp á sikt verður komið á mál, og tað kann vera óheppið at leggja gjaldið ov høgt. Tað kann væl vera, at tað fyri fyrst er neyðugt at finna aðra/eyka fígging. Kemur lógin í gildi beinanvegin, kann væntaða ársinntøkan setast av til ábøtur longu í vár.
Tí eigur fyri fyrst at vera gjørligt at leggja upp fyri hesum og fyri fyrst raðfesta og loysa veruligar avbjóðingar, har sum hol er slitið á hógvin, og har sum tørvurin tí er størstur.
Tað er óneyðugt at lata pening har sum eingin trupulleiki er, hóast har eru ferðafólk.

Tað er, sum eisini nevnt ísv hoyringina í Havn, óheppið fyri m.a. veruliga matvøruframleiðslu og matsjálvbjargni at prísseting av landbúnaðarjørð verður eftir øðrum enn møguleikar til matvøruframleiðslu.

Eisini er betri, at ein veruligur myndugleiki lokalt umsitir ferðavinnugjaldið, enn ein bygd elal lokalnevnd, sum ikki er útgjørd og egnað til at skráseta og umsita inntøkur og útgjøld rætt. Ætlaða gjaldið til bygdir og jarðeigarar/festarar kann meiri hóskandi verða latið kommunum, sum so kunnu lata møguligum lokalnevndum og jarðeigarum/festarum fundarpening og gjald fyri møguligt arbeiði, men soleiðis at kommunan eigur gøtur og eitthvørt annað, sum skal gerast, eitt nú merking av gøtum/gonguleiðum.

Nógvir ognarar og festarar hava fatan av, at teir kunnu gera, sum teir vilja
Tað eigur onkrastaðni, um tað er í ferðavinnulógini ella aðrasteðs at verða forðað fyri, at jarðeigarar ella festarar av sínum eintingum marka gøtur á óburðardyggan hátt, t.d. við alirørum ella fóðurslangum, sum tað t.d. er gjørt á Viðareiði, ella við plastikkstrimlum, sum t.d. gjørt er í Saksun. Tí er tørvur á onkrum standardum, gjarna galdandi fyri landið ella hvørja kommunu, ið áseta, hvat ið er nýtuligt til slíkt. Í tann mun pláss skal vera fyri innovativum loysnum, ið ikki eru fevndar av slíkum standardum, ber til at áseta, at kommunur ella annar avvarandi myndugleiki skulu góðkenna hesar, t.d. Umhvørvisstovan.

Vh,

Roar Heini Olsen,
Landbúnaðarfrøðingur